Landssjúkrahúsið:

Nú verða nógv longri bíðitíðir

Hetta fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri sjúklingarnar, men tað má leiðslan á Landssjúkrahúsinum taka ábyrgdina av, siga sjúkrasystrarnar

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

– Tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri sjúklingarnar, at royndirnar at finna semju um arbeiðsviðurskiftini á B 6, nú eru slitnaðar.

Tað ivast Ingun Gaardbo, álitisfólkið hjá sjúkrasystrunum á B 6 onga løtu í.

Hon sigur, at tað sum nú hendir, verður eitt álvarsligt bakkast fyri sjúklingarnar, men tað má leiðslan og avvarðandi myndugleikar taka uppá seg.

Hon sigur, at uppsagnirnar hjá teimum18 sjúkrasystrunum standa sostatt við og at tað er sjálvsagt at tað fer at fáa avleiðingar.

–Skal tað ikki fáa avleiðingar, tá ið 18 sjúkrasystrar á eini deild á Landssjúkrahúsinum fara úr starvi ísenn, hevði tað verið rímiligt at spurt, hvat vit hava verið har til, sigur hon.

Á Landssjúkrahúsinum eru tvær heiliráðsdeildir, B 6 og B 7.

Hon ivast ikki í, at tað arbeiðið, sum nú verður gjørt á B 6, fer at verða flutt yvir á B 7.

– Men har hava tey eisini ivaleyst at gera og kunnu ikki eisini átaka sær arbeiðið, sum hevur verið gjørt á B 6.

– Tí fer tað uttan iva at føra við sær, at bíðitíðin til ymsar tilrættislagdar kanningar og viðgerðir, fara at verða munandi longri, tí trýstið á deildina, sum verður opin eftir nýggjár, verður nú tvær ferðir størri, enn tað hevur verið og tað merkist.

–Figgjadagin verður B 6 á Landssjúkrahúsinum stongd og sum tað sær út í løtuni, verður líka tómligt eftir nýggjár, tí uppsagnirnar hjá teimum 18 sjúkrasystrunum stendur við. Ingun Gaardbo, sjúkrasystir og álitisfólk á B 6 ivast ikki í, at tað fer at føra væl longri bíðitíðir við sær

Ingun Gaardbo sigur, at á B 6 hava tey havt nøkur serøki, eitt nú sukursjúku, sjúkur í nervalagnum, eitt nú heilabløðingar, blóðproppar og svullir í heilanum, krabbameinssjúklingar, sjúkur í maga og sodningarlagi og blóðsjúkur.

–Eg ivist ikki í, at tað nú fer at taka munandi longri tíð at sleppa fram at verða kannað fyri sjúkur av hesum slagi og tað fer eisini at at taka longri tíð at sleppa framat hjá serlæknum at fáa viðgerð fyri hesar sjúkur, sigur Ingun Gaardbo.

Hevði borið til

Annars ivast hon ikki í, at tað hevði borið til at umskipa B 6 og B 7, øðrvísi, soleiðis at B 7 bleiv dagambulantorium, sum varð opið frá 8- 16 hvønn dag, har sjúklingar fingu ymsar viðgerðir, soleiðis sum leiðslan hevur skotið upp. Samstundis skuldi B 6 verða ein songjadeild við pláss fyri 24 sjúklingum. Sostatt skulu bæði sjúklingar og starvsfólk býtast ørðvísi ímillum deildirnar, enn nú.

– Men at gera tað soleiðis sum umstøðurnar eru í løtuni - undir tíðartrýsti, nú vit eru komin út á eggina, er lítið skilagott, tí tá verða fyrireikingarnar ikki so góðar, sum tær eiga at vera.

Ingun Gaardbo sigur eisini, at tá ið nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu um hálvtannað ár, hevur ætlanin verið at umskipa deildirnar tá, og at gera eitt dag-ambulatorium, sum ætlanin nú er at gera á B 7.

–Men av tí, at hendan støðan er íkomin, verður hetta framskundað, og tað gongur ov skjótt fyri seg, tí slíkar umleggingar eiga at verða gjørdar í friðartíð. At gera tað undir trýsti, ger,a t fyrireikingarnar verða ikki so góðar, sum tær eiga at vera.

Landssjúkrahúsið:

Royndin at finna semju á B 6 er slitnað

– Tað, sum nú fer at henda á Landssjúkrahúsinum, má standa fyri leiðslunnar egnu rokning, sigur Ingun Gaardbo, álitisfólk hjá sjúkrasystrunum á B 6

Semingsroyndirnar í ósemjuni um B 6 eru slitnaðar. Nú hava vit sagt síðsta orðið, siga sjúkrasystrarnar

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

–Nú er tað seinasta orðið sagt. vit gera ikki meiri fyri at finna semju, so nú má leiðslan um rest.

Ingun Gaardbo, álitisfólk hjá sjúkrasystrunum á B 6, sigur, at nú vendist ikki aftur í málinum um arbeiðsumstøðurnar á B 6.

Seinnapartin týsdagin lótu sjúkrasystrarnar á B 6 leiðsluni á Landssjúkrahúsinum eitt semingsuppskot um, hvussu ein loysn kundi finnast á trætuni.

Ósemjan um arbeiðsviðurskiftini hava fært við sær, at 18 av teimum 23 sjúkrasystrunum á B 6 hava sagt upp og fara úr starvi 31. desember.

Og tær hava boðað frá, at semingsuppskotið týsdagin er teirra seinasta roynd at finna semju, so at tær kundu fáast at taka uppsagnirnar aftur.

Sjúkrasystrarnar hava kravt 1,8 sjúkrasystir afturat á B 6. Men tað vil leiðslan ikki ganga við til og hevur ístaðin skotið upp, at deildirnar B 6 og B 7 verða samanlagdar og spesialiseraðar. Tað fer at føra betri arbeiðsviðurskifti við sær.

Hetta vilja sjúkrasystrarnar ikki góðtaka treytaleyst.Tær standa fast við, at tær vilja hava fleiri sjúkrasystrar á B 6, men tað seinasta semingsuppskotið frá teimum, sum tær løgdu fyri leiðsluna týsdagin, gekk út uppá, at hendan 1,8 sjúkrasystruin kundi verða sett í tíðaravmarkað starv, til B 6 og B 7 eru umskipaðar.

Tá ið blaðið fór til prentingar á miðdegi í gjár, hevði leiðslan á Landssjúkrahúsinum ikki svarað formliga. Men í loftbornu fjølmiðlunum týskvøldið, gjørdi leiðarin á Landssjúkrahúsinum, Jóannes Erik Køtlum, greitt, at fleiri fólk blivu ikki sett á B 6, heldur ikki í tíðaravmarkað størv.

Seinasta orðið sagt

Hetta var eitt stórt vónbrot fyri sjúkrasystrarnar á B 6.

–Nú gera vit ikki meiri. Vit hava sagt seinasta orðið í hesum máli og uppsagnirnar standa sostatt við, sigur Ingun Gaardbo.

Tískil fara 18 sjúkrasystrar á B 6 úr starvi 31. desember. Men í veruleikanum fara tær úr starvi í morgin, tí tá letur B 6 aftur og skuldi ikki lata uppaftur, fyrrenn 7. januar.

– Vit ætla ikki at brúka meiri tíð upp á hetta málið, tá ið vit eru farnar, eru vit farnar. Tað einasta, sum kann fáa okkum at tosa við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum aftur, er at hon kemur við einum púra greiðum tilboði til okkara um at fáa fleiri fólk, sigur álitisfólkið á B 6.

– Nú má leiðslan um rest. Tað, sum nú fer at henda á Landssjúkrahúsinum, má standa fyri hennara rokning, sigur Ingun Gaardbo.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa orðið á leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Støðan eisini ógreið á B 7:

Vit hava ivaleyst at gera sum er

– Ósemjan á B 6 skal ikki føra við sær, at vit fáa meiri at gera á B 7, sigur álitisfólkið á B 7, Laila Danielsen

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

– Ósemjan á B 6 skal ikki føra við sær, at vit fáa meiri at gera.

Tað ger Laila Danielsen, álitisfólk hjá sjúkrasystrunum á B 7, púra greitt í gjáramorgtunin.

Nú semingsroyndirnar á B 6 eru slitnaðar, endurtekur hon sostatt tað, sum sjúkrasystrarnar á B 7 skrivaðu til leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, tá ið ósemjan um arbeiðsviðurskiftini á B 6 varð almenn fyri nøkrum vikum síðani.

Nú sjúkrasystrarnar á B 6 hava gjørt greitt, at tær vera ikki við í fleiri samráðingum um B 6, er væntandi, at ta arbeiðið, sum hevur ligið á B 6, verður flutt á B 7, sum er hin heiliráðsdeildin á Landssjúkrahúsinum.

Men sjúkrasystrarnar á B 7 góðtaka ikki, at fáa meiri at gera.

Tær hava áður boðað leiðsluni á Landssjúkrahúsinum frá, at tær stuðla sjúkrasystrunum á B 6.

–Á B 7 hava vit ivaleyst at gera, sum er. Støðan hjá okkum er ikki nógv øðrvísi, enn hon er á B 6, so vit tola ikki størri arbeiðstrýst, enn vit hava nú, sigur Laila Danielsen í eini stuttari viðmerking.

Jól á Barnadeildini

Ilt er at siga, hvussu nógv børn halda jól á barnadeildini í ár. Tó plagar talið at liggja um 3-4 børn

Mynd: Jens Kr. Vang

JÓL
Ingrid Bjarnastein

Jólini eru nakað heilt serligt, tað vita vit øll. Ikki minst fyri børnini hevur henda høgtíðin nakað serligt at siga. Gávurnar, træið, maturin og hugnin, sum fløvar eitt heim um jóltíðir er nakað, sum bert kemur fyri einaferð um árið. Tó eru tað ikki øll, sum fáa henda møguleika, tí tey eru plágað av sjúku ella øðrum, sum ger, at tey ikki sleppa heim til jólar.

Barnadeildin á Landssjúkrahúsinum hevur seinastu árini havt um trý til fýra børn á jólum, og royna tey at gera jólini hjá børnunum, sjálvt um tey eru innløgd, so hugnalig sum møguligt.

– Sjálvandi fara tey, sum kunna fara heim, til hús, sigur deildarsjúkrasystirin á barnadeildini, Tove Thomsen.

– Men vit royna sjálvandi at gera jólini so hugnalig sum møguligt. Vit hava pyntað her á deildini og sett eitt jólatræ upp. Jólaaftan fáa børnini so dunnu ella gás til døgurða um kvøldið, og um tað er møguligt hjá familjuni at vera við, so stilla vit borð upp til teirra her, so familjan kann vera saman.

Um børnini eru nóg stinn og nóg mikið av fólki er, so verður eisini dansað um træið, børnini fáa jólagávur, bæði frá deildini og tær, sum foreldur og systkin hava tikið við.

– Vit royna at gera hetta so gott sum vit kunna, sigur Tove Thomsen víðari.

– Tey børnini, sum eru her, eru jú her tí tey eru rættiliga sjúk, so tað er avmarkað, hvussu nógv tey orkað. Men tey, sum eru her nú, sleppa øll heim. Men hinvegin er tað ringt at siga, um nakar verður her á jólum. Ongin dagur er eins, og tí vita vit ikki, hvat kann koma fyri.

Deildarsjúkrasystirin sigur, at hon heldur, at børnini góðtaka tað, at tey skulu halda jól á sjúkrahúsinum. Tá familja og systkin eru við, so er tað ikki so ringt hóast alt. Men hinvegin er tað ikki stuttligt hjá nøkrum at halda jól á sjúkrahúsinum.

Nokta seg sekan

Tann 31 ára gamli maðurin og tann 19 ára gamla kvinnan, sum vórðu tikin við 5 kilo av hassji, tá tey komu úr Norrønu tann 19. november, noktaðu seg sekan í at hava brotið lógina um euforiserandi evni. Dómsviðgerð var mikudagin, men dómarin valdi at hava rættarfundin fyri afturlatnum hurðum

SMUGLING
Stefan í Skorini

Mikumorgunin nakað fyri klokkan níggju møtti tað danska parið upp í rættinum eftir at hava sitið í varðhaldinum síðan 19. november. Tvær tær fyrstu vikurnar av hesum tíðarskeiðnum vóru tey avbyrgd.

Tey eru ákærd fyri at hava smuglað 5 kilo av hassji, sum vórðu goymd í einum eykahjóli undir bilinum. Tey komu við Norrønu til Føroyar og skuldu bara steðga í nakrar heilt fáar dagar.

Ákæran er, at tey hava smuglað ólóglig rúsandi evni til landið við tí fyri eyga at selja tey víðari. 5 kilo av hassji hava eitt virði uppá góðar 600.000 krónur á gøtuni.

Bæði noktaðu seg sekan í hesum lógarbroti. Tó mótmæltu tey ikki, at hassjið var í bilinum.

Afturlatnar hurðar

Ákærin kravdi, at rættarfundurin varð hildin fyri afturlatnum hurðum. Hon legði dent á, at kanningarnar hjá løgregluni í hesum málinum ikki vóru lidnar. Tí hevði tað verið óheppið, um allir smálutir verða avdúkaðir. Verjin hevði ongar viðmerkingar til hetta ynskið.

Dómarin metti eisini, at tað var rímiligt at ganga hesum ynski á møti, og rættarhølini vórðu latin aftur.

Tá blaðið fór til prentingar, var rættarfundurin ikki liðugur. Meira verður at frætta um hetta málið í blaðnum í morgin.